# TILTØK OKTOBER 2004



**Myndaframsýningin hjá Mikael Jensen (DK) er í húsinum til og við 31. oktober**

**Framsýningin "Rættindi hjá brekaðum og fyrimyndarreglurnar hjá ST", er í húsinum til og við 15.oktober**

**Fríggjadagur 1. oktober**
**Kl. 13.30** **Vinnudagur 2004 (FO)** ráðstevna.
Fyriskipari: Vinnuhúsið

**Sunnudagur 3. oktober**
**Kl. 16.00** **ManWoMan (Íslendsk/Finsk)**
dansiframsýning

**Mánadagur 4. oktober**
**Kl. 10.00** **Tónleikaverkætlan (FO) ráðstevna.**
Fyriskipari: Menningarstovan

**Týsdagur 5. oktober**
**Kl. 13.00** **Rættindi hjá brekaðum og fyrimyndarreglurnar hjá ST (FO) ráðstevna.**
Fyriskipari: Almanna- og Heilsumálaráðið

**Rættindi hjá brekaðum og fyrimyndarreglurnar hjá ST (FO) framsýning í Foyerini.**
Fyriskipari: Almanna- og Heilsumálaráðið

**Hósdagur 7. oktober**
**Kl. 19.30** **Fundur NORDPLUSS (FO).**
Fyriskipari Norrøna Felagið í Føroyum

**Fríggjadagur 8. oktober**
**Kl. 20.00** **Føroyskur Barnadansur (FO)**
Dansifelagið í Havn og Norðurlandahúsið

**Sunnudagur 10. oktober**
**Kl. 16.00** **Heiðurskonsert H.J. Højgaard til minnis (FO)**
Havnarkórið og Føroya Symfoniorkestur

**Leygardagur 16. oktober**
**Kl. 16.00** **Konsert Húsakórið í Keypmannahavn (DK/FO)**

**Sunnudagur 17. oktober**
**Kl. 16.00** **HB 100 ár (FO). Havnar Bóltfelag skipar fyri móttøku, framsýning og tiltaki**

**Fríggjadagur 22. oktober**
**Kl. 09.00** **Norðurlendsk musikk- og sanglæraraáðstevna.**
Fyriskipari: Føroya Musikklærarafelag

**Fríggjadagur 22. oktober**
**Kl. 20.00** **Føroyskur barnadansur (FO)**
Dansifelagið í Havn og Norðurlandahúsið

**Leygardagur 23. oktober**
**Kl. 09.00** **Norðurlendsk musikk- og sanglærarararáðstevna heldur fram**

**Hósdagur 28. oktober**
**Kl. 08.00** **Bláí Krossur 100 ár (FO) ráðstevna.**
Fyriskipari er Bláí Krossur Føroya

**Fríggjadagur 29. oktober**
**Kl. 20.00** **Føroyskur barnadansur (FO)**
Dansifelagið í Havn og Norðurlandahúsið

**Sunnudagur 31. oktober**
**Kl. 16.00** **Føroya Symfoniorkestur, konsert (FO).**
Spæld verða verk eftir Beethoven: Egmont Ouverturan. Klaverkonsert nr. 1. 5. symfoni.
Dirigentur Bernhard Wilkinsson (UK)
Solistur: Johannes Andreasen (FO)

**Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00**

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790**
**www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo**

## Avloysari til Ferðaráð Føroya

Fyri starvsfólk í farloyvi frá 1. november 2004 til 31. januar 2006, sóknast Ferðaráð Føroya eftir avloysara til innlendisdeildina. Tíðaravmarkaða starvið verður at seta sum skjótast.

Arbeiðið fevnir um samskifti og samstarv við økisferðavinnufeløg, kommunur, aðrar mynduleikar og vinnuna um verkætlanir av ymsum slag.

Arbeiðið verður lagt til rættis í samstarvi við leiðsluna

Vit vænta, at umsøkjarin hevur hesar førleikar:
- ✓ Útbúgving og royndir innan ferðavinnu og møguliga innan verkætlanarleiðslu
- ✓ Holla vitan um Føroyar sum ferðamannaland og føroysk viðurskifti sum heild, herundir vitan um flutnings-, gistingar- og útferðarmøguleikar
- ✓ Kunnleika til og um aktørar í ferðavinnuni
- ✓ Dugir væl at samskifta á føroyskum, donskum og enskum og hevur góðan telduførleika.
- ✓ Hevur góð samstarvsevnir og dugir at arbeiða sjálvsstøðugt

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið / viðkomandi yrkisfelag.

Skrivlig umsókn skal vera Ferðaráðnum í hendi, í seinasta lagi 18. oktober 2004.

Ferðaráð Føroya
Postsmoga 118
110 Tórshavn

Ynskjast fleiri upplýsingar um starvið, kunnu áhugaði venda sær til leiðaran á Innlendisdeild Ferðaráðsins, Per Hansen, á telefon: 355 800 ella teldupost: per@tourist.fo

## ÓGILIDISLÝSING
### Mortifikatión

Fráboðað er Føroya Lívstrygging, at niðanfyri nevndu tryggingarskjøl eru burturblivin

14-1225
Finnbjørn Karbech Mouritsen
14-1412
Jacob Martin Kambskarð
14-4362
Bjørg Haraldsen
14-6565
Marner Nón Bjartalíð
14-21058
Heðin D. Poulsen
14-21329
Fríða Petursdóttir
14-21817
Joan Steinberg Joensen
14-21995
Andrias Mortan Elmelund Petersen
14-22068
Karl Hansen
14-57007
Elmar Arnar Mikkelsen
14-811510
Jóanes Pauli Blástein
14-870137
Jóannes Ennistein Heinesen
14-870217
Páll Johan Kunoy
14-870748
Sigvør Lam-hauge
14-871111
Jens Sigmund Sørensen

Tey, ið møguliga hava nevndu tryggingarskjøl í hendi, verða biðin at prógva ognarrætt sín áðrenn 6 mánaðir eru farnir. Prógvar eingin ognarrættin, áðrenn nevndu tíðarfreist, verða skjølini søgd ógildug, og nýggj tryggingarskjøl útskrivað.

Tórshavn, tann
1. oktober 2004

FØROYA LÍVSTRYGGING

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við



NÚ SEYMISKEIÐINI BYRJA LATA VIT 20% AV ØLLUM METURVØRUM Í VIKU 41 OG 42

Tilhoyr, sum saksar, minstur o.a. fáa tit eisini her

Kom inn á gólvið og síggj okkara nýggja og fjølbroytta úrval av meturvørum, klæðum og tær vælumtóktu Pilgrim smúkkurnar

Vit eru altíð fúsar við bestu vegleiðing

Opið er: mánadag - hósdag 10.00 - 17.30
fríggjadag 10.00 - 18.00
leygardag 10.00 - 14.00

SONJA DESIGN
Stoffalág 41 • 100 Tórshavn • Tel. 314979

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin

## Sjúkrarøktarfrøðingur til D2

Fulltíðar farloyvisstarv sum sjúkrarøktarfrøðingur í skiftandi vaktum á Deild2 er leyst at søkja til setan 16. november 2004 til 31. august 2005.

Deildin er ein akut viðgerðardeild. Á deildini starvast sjúkrarøktarfrøðingar, pleygarar og heilsurøktarar. Deildin er ein áhugaverd deild við nógvum avbjóðingum. Vit leggja okkum eftir, at starvsfólkið er í støðugari menningin og áhaldandi at betra um terapeutiska umhvørvið á deildini.

Arbeitt verður eftir kontaktpersónaskipanini og miljøterapeutiskum meginreglum. Deildin hevur tætt samstarv við aðrar fakbókar, so sum lækna, sálarfrøðing, ergo- og fysioterapeut. Saman eru vit eitt lið, sum er um hin einstaka sjúklingin.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Upplýsingar um starvið:**
Meira um starvið fæst at vita um við at venda sær til Birgit Andersen, deildarleiðara á D2 tlf. 304500, lokal 4002 ella til Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 4102, ella e-post bergitw@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 18. oktober 2004 kl. 12.00.

**Skrivlig umsókn**, merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*

## BÁTUR TIL SØLU



Um hóskandi boð fæst, er M/S Randi til sølu uttan fiskiloyvi.

Tel 218397 / 448397

GSM telefonir
Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic
Tráðleysar
Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast
Til skip og bátar
NMT 450 - VHF telefonir v.m.
Storno
SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Skúlavørður

Tórshavnar kommuna søkir eftir skúlavørði til Hoyvíkar skúla.

**Arbeiðið**
Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. hesar:
- at røkja bygningar og økið uttanum skúlan
- at gera umvælingar
- at ljós, hiti og sanitetsviðurskiftini í skúlanum eru í lagi
- at trygdarbúnaðurin virkar sambært ásettum krøvum
- at halda reint og ruddiligt inni og úti
- at hava umsjón við og samskipa reingerðina í skúlanum

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava handverkaútbúgving, duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevni.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett skjótast gjørligt. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
Gjølligari upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Birgit Arge, skúlastjóri, tlf. 31 50 73 ella Eivind Danielsen, byggifrøðing, tlf. 30 20 10.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir og møguligum viðmælum skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. oktober 2004. Viðmerkið umsóknina "Skúlavørður".

Í Hoyvíkar skúla eru 450 næmingar. Har starvast 33 lærarar.

www.torshavn.fo

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!